FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 4. november 2019

J.Nr.: 19/00340

Svar upp á fyrispurning nr. 1/2019 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurning frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um tunlarnar norður um Fjall.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður gongd sett á at bora tunlarnar norður um Fjall

2. Hvør fíggjarleistur skal brúkast til at fíggja tunlarnar norður um Fjall

Svar:
Samgongan vil tryggja hóskandi ferðasamband kring alt landið. Eitt væl útbygt og væl virkandi samferðslukervi hevur alstóran týdning fyri vinnuna og trivnaðin kring alt landið. Landsstýrið fer beinanvegin at gera eina samferðsluætlan, har íløgur í tunlar, undirsjóvartunlar, vegakervi og ferjur verða raðfestar innanfyri langtíðar løgukarmin.

Tunlarnir norður um Fjall, lótu upp ávíkavist í 1965 og 1967, og eru sostatt næst elstu tunlar í Føroyum. Teir eru ótíðarhóskandi, og lúka als ikki dagsins krøv til dygd og ferðslu. Tað er neyðugt at gera nýggjar tunlar, sum lúka øll nútíðar krøv, borgarum og vinnu til gagns.

Stórar verkætlanir eru í gongd, og fíggjarligar bindingar eru gjørdar. Íløgukarmurin er avmarkaður, men tunlarnir norður um Fjall eru raðfestir fremst av teimum stóru tunnilsverkætlanunum. Arbeitt verður við Hvalbiarfarleiðini nú, og er verkætlanin júst framskundað við eykajáttan. Samb. fyriliggjandi løguætlanum, er ætlanin at fara undir tunlarnar norð um Fjall, so skjótt Hvalbiartunilin er liðugur.

Samgongan kannar tó møguleikar at framskunda verkætlanina norður um Fjall og hvussu hon kann fíggjast.

Tinganes, 11. oktober 2019

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum